góðir við eini framførðslu, sum vildi nakað og sum fekk fólk við. Synarchy spældu alt ov hart og guitarljóðið var ikki nóg væl definerað, so riffini hjá teimum, sum man hómaði í ganginum, komu ikki til sín rætt.

Tveir bólkar, sum ikki søgdu mær nakað sum helst, vóru The Dreams og Frostbit. Keddur av at siga tað, men tað sýntist sum hvørgin av hesum bólkum týmdi at hava nakað uppá hjartað og tí vóru teir simpulthen reyvhamrandi keðiligir, tó var The Dreams tann betri av teimum. Men kanska hava teir so stórar dreymar um útheimin, at teir gloyma, hvør fostrar teir ?

So vóru tað tær tríggjar damurnar, sum høvdu allierað seg við summum av teimum, sum okkum dámar at kalla okkara bestu tónleikarar: Tað var synd í hesum bólki. Tí har hendi ikki ein skid. Væl sungu tær, tað er vist, men eg skilti ikki, hvat tær ætlaðu við hasum milimeturharmoniunum. Eitt amerikanskt fyribrygdi, sum ikki riggaði á pallinum hetta kvøldið. Og at betru tónleikarar landsins ikki klára at fáa meira luft undir sollarnar,tað er bara synd.

ungum, evnaríkum tónleikarum, sum flestir eru úrslit av okkara eitt sindur útforhungraðu men annars útmerkaðu Musikkskúlaskipan. Damurnar, sum sungu kór, gjørdu tað, at tey fínu poppløgini lyftust upp á eitt gott støði og hava tey avgjørt eitt stórt trúvirði og potentiali. Ein bólkur, sum eg vóni fer at gera meira um seg í framtíðini.

Leygarkvøldið hendi tað (Hjá Anytime), sum ikki mátti henda, nevniliga at ljóðtóknin ikki kundi fylgja við. Samanlagt kann sigast um ljóðið, at annleggið var tann reina skræpa. Tað er næstan líkamikið, hvussu væl tú dugir at skrúva uppá knapparnar, um so er at annleggið ikki kann fylla rúmið. Ùrslitið er, at antin er alt ov spakuligt ella alt ov hart frá og ongantíð er tað tilpass, so tú hoyrir, um teir duga síni ting á pallinum. So Jón næstu ferð "ryst upp við nøkrum krónum og syrg fyri, at ordiligt ljóð er í húsinum. Tað er annars nokkso flott, at tónleikararnir skulu liva upp til eina rúgvu av krøvum og so kunnu fyriskiparnir ikki syrgja fyri tí mest basala, nevniliga ljóðinum.Tað er ein stór skomm.



Leygarkvøldið tók Marius meg so mikið á bóli, at eg satsaði bólkin sum ein absuluttan vinnarafavorit.

## Frá mánadansi til fínar popptónar

Eg var so heppin at hoyra Brand Enni fríggjakvøldið. Hansara nýggi bólkur Anytime, var mannaður av heilt



*Týr trýna á pallin í netundirtroyggju. Ein anakronisma, sum bendir mín tanka til svágin hjá Hyasynth, Onslow.*

## Marius

Var eitt, sum tey á nýføroyskum kalla eitt yvirraskilsi. Eg gjørdist sera bilsin, tí seinast eg hoyrdi bólkin, var tað reint út sagt keðiligt, eitt mainstreamprodukt við ongari meining og einum arrogantum skugga, sum sikkurt bara var til at skava útyvir ein vissan ótryggleika. Men leygarkvøldið tóku teir meg so mikið á bóli, at eg satsaði teir sum ein absuluttan vinnarafavorit. Teir høvdu góð løg og eitt yvirskot, sum kom út um pallin. Marius sang væl, Heðin spældi væl o.s.v. o.s.v, men tað sum mær var líka við at dáma allarbest, var físandi Gøtuorglið(gott nokk úr Leirvík) hjá Knúti. Fínasta slag at teir vunnu. Men..... danski yvirdómarin hevur sikkurt havt okkurt orðið har. Tí Marius var kanska tað mest mainstreamað sum var, men eg haldi absulutt ikki tað mest originala. Teir spældu fínt, men alt er hoyrt fyrr, uppá onkran annan máta.

## Døming

So eitt skot til dømingina. Tað er synd, at dómararnir ikki døma eftir originaliteti. Teir døma eftir hesum merkilga MTV ella hvat tað er fyri formi. Tað ger, at øll skræpan er grøn. Alt ljóðar líka, og ongin hevur nakað uppá hjarta.

Og so leingi ein Dani situr í føraradómarasessinum, so er ongin vón um, at tann so absulutt nøgv besti bólkurin á konsertini (kappingini) leygarkvøldið, bólkurin, sum slerdi allar rekordir og sum, sjálvt um hann spældi sera hart, ljóðaði so nógv feitast og hevði so nógv tað mesta powerið,v ar uttan iva SIC, ein tornadu av eini aðrari verð. Eitt útrykk, sum ein danskur dómari má ræðast sum pestina, tí í kapping við Mikkjal má ein og hvør smáamatørur dvína. So sjálvt um Marius kom uppfrá, so kom hann ongantíð uppí ta hæddina, sum SIC høvdu frá fyrsta slagi. Eitt totalt rokkshow, sum sendi Týr (sum spældu beint aftaná) í skammikrókin við teirra lítlu onkisigandi donsku krønikku.

Kanska vunnu SIC ikki dreingjadeildina í Fuglafirði. Men tað ger onki, tí teir eru superligain, og vit skulu vera glað fyri, at teir yvirhøvur tíma at tveita orkusopannina í høvdið á okkum. Tí um skamma stund so vera teir at hoyra í útlandinum. Tá mugu sjálvt danir boyggja seg í støvinum fyri tí almikla King of Fokking Darkness, størstu rokkrøddini nakrantíð, her á hesum forpoppaðu klettum.

So SIC vóru avgjørt teir moralsku vinnararnir hetta kvøldið.

## ART aðalstuðul hjá tónleikinum

Tað var nokk so hugstoytt at hoyra Elina siga navnið á øllum Stuðlunum. Men at gloyma tann so avgjørt størsta stuðulin til snøgt sagt næstan øll tónleikatiltøk her á landi, ART(Áhugafelag RokkTónleikarana), var eitt sindur skuffandi.

Hví tað kann einhvør so spyrja. Sera einfalt er svarið. 6 av luttakandi bólkunum komu úr ART. 5 av teimum 12 finalistunum komu úr ART í Havn. Ikki kann sigast annað enn, at ART Er høvuðsleverandørur og stuðul til eitthvørt tónleikatiltak.

Sum dagligur leiðari av ART, eri eg sera feign um hetta , men eisini eitt sindur beiskur, tí tað kann væl vera, at onkur annar stuðul hevur stóran týdning. Men um vit ikki leveraðu tónleikin var ongin kapping.

Í hesum sambandi vil eg vísa á tær sera góðu sømdir ART hevur og fær frá Tórshavnar Kommunu, ein kommuna, sum hevur funnið út av, at tað er alneyðugt at vera opin fyri framtíðini og villig til at vera við til at stimbra og stuðla ein aktivan ungdómsmentanarpoltikk. Nú sæst í verki, at tað loysir seg at hava ein positivan hugburð mótvegis ungdómsmentanini. Og vil eg tí heita á myndugleikar, kommunur og onnur um at hyggja eftir, hvat vit hava gjørt í Havn. Lær av okkara royndum og feilum okkara.

## Samanlagt um tiltakið Global Batle of the Bands

Eitt gott við hesum konseptinum er, at bólkarnir bert skuldu spæla í umleið 8 minuttir. Hetta gjørdi, at ongin bólkur náddi at gerast alt ov keðiligur.

Annað er at eitt slíkt tiltak fær teir mongu ungu tónleikarnar at taka seg saman, venja nøkur løg so mikið væl, at tað virkar sum um bólkurin faktisk er betri, enn vit sum regul vita, at teir eru. Men tað ger ikki so ræðuliga nógv, tí tað var feitt at vera til konsert, har man næstan ikki náddi at keða seg. At ljóðgóðskan so var hareftir, ja tað er bara keðiligt. Tað ber ikki til, at fyrireikarar krevja ein proffesionellan hugburð frá bólkunum og so sjálvir vera so av lagi amatøragtigir, tá tað snýr seg um ljóðgóðskuna. Tað átti ikki at verið neyðugt at sagt tykkum, at ljóðið faktiskt er ein nokkso stórur partur av einum estetiskum tónlistaligum upplivilsi.

So Jón góði. Takk fyri eitt sum so útmerkað tiltak. Takk fyri at tú tímir at standa á odda fyri tiltøkum, har tónleikararnir sleppa at royna seg. Eg eri kanska ikki so samdur við akkurát hesi uppskriftini. Men eri altíð við uppá tað, tá vit skulu skapa betri umstøður fyri tónleikinum og tónleikarunum her á landi.

So til allar Føroyingar. Bara tí at poppmainstreammaskinan Marius vann Globala trippið, so er onki tapt. Blív við. Keep on rocking…

Annars tillukku Marius, all the best!